**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 29. oktober 2014, kl. $19^{00}$.**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 101**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Regin í Gerðinum og Betty í Gerðinum um umskipan uttangarðs ímillum ognir teirra matr. nr. 137a og 255c.
J.nr. 01.04.00-G01-3-14

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 22. oktober 2014 umsókn frá Regin í Gerðinum og Betty í Gerðinum um umskipan uttangarðs ímillum ognir teirra matr. nr. 137a og 255c.

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 101**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

John Zachariassen greiddi frá um mál 102. Eftir frágreiðingina fór John Zachariassen av fundinum, og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Mál 102**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um tilboð frá Munin upp á at leggja eitt lag avtrat almenna kortinum.
J.nr. 00.13.06-G01-1-14

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 22. oktober 2014 tilboð frá Munin upp á at leggja eitt lag avtrat almenna kortinum.

Munin bjóðar Vestmanna Kommunu 3D-lag at leggja á almennna kortið á heimasíðuni hjá kommununi. Við hesi effektini ber betri til at orientera seg um, hvar t.d. staðarnøvn eru.
Hetta 3D-lagið kann Munin gera og leggja inn á http://alment.kort.fo/kort/vestmanna.html fyri kr. 4.800 u. mvg.

Nevndin samtykti at leggja tilboðið fyri bygdarráðið til støðutakan.

**Viðv. 102**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, skjeyt upp at taka av tilboðnum frá Munin upp á 3D-lag at leggja á almennna kortið á heimasíðuni hjá kommununi.
Tilmælið varð einmælt samtykt.

John Zachariassen komin aftur á fundin.

**Mál 103**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015.
J. nr. 00.30.10-S02-1-14

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 22. oktober 2014 uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015.
Nevndin samtykti at leggja uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015 fyri bygdarráðið til 1. viðgerð.

**Viðv. 103**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015 varð lagt fram.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 23.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson

Malan Stórá Durita á Heygum Herit Magnussen John Zachariassen